e-mail: jakup@sosialurin.fo

**Ítróttur**

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Skulu læra av mistøkunum

*Poul Michelsen ásannar, at nógv mistøk vórðu framd í fyrireikingunum til landsdystin mikukvøldið. Hann leggur tó dent á, at tey hava lært av hesum, og at tey eisini fyribyrgja hesum í framtíðini*



*Poul Michelsen sigur, at teir hava fingið nógvar royndir av landsdystinum mikukvøldið*

Jákup Mørk

Hóast fólk sum heild tóktust væl nøgd við handfaringina av landsdystinum millum Føroyar og Danmark, so vóru eisini fleiri illsinnisgleps at hoyra um fæntandi fyriskipan.

Eitt nú ilskaðust fleiri um, at meðan nøkur atgongumerki vóru raðfest við nummarrøð, vóru onnur, har einki nummar var á. At nummarleys setur vórðu seld, hevði við sær, at hjá teimum, sum komu seint til dystin, var sera trupult at fáa sitipláss, og var talan um ein bólk, var hetta snøgt sagt ógjørligt.

Betri gjørdist tað ikki av, at børn undir 7 ár høvdu ókeypis atgongd, uttan at nakað setur tó varð sett av til teirra. Hetta viðførdi, at setur, sum í veruleikanum vórðu seld øðrum, vórðu upptikin. At vallarvarparin róptu boð til foreldrini at hesum um at hava børnini hjá sær, munaði lítið í so máta.

### Illa staddir suðringar

Hjá teimum suðringum, sum komu við seinna túrinum hjá Smyrli, mundi støðan gerast serliga ring.

Fyrst og fremst var Smyril seinkaður, tí hann mátti liggja á Redini eina løtu, áðrenn siglast kundi inn í havnina, og tí komu suðringarnir ikki til dystin fyrr enn beint fyri dystarbyrjan. Tá var nærum ógjørligt at fáa nakað sitipláss, og í síni neyð stillaðu tey seg við nøkur lýsingarskelti, men her fingu tey so ikki loyvi at standa.

Støðan kundi verið heilt álvarslig, tí tað kom nærum til samanbrest millum onkran ónøgdan áskoðara og ein av fyrireikarunum, men álvarslig gjørdist støðan tíbetur ikki.

Loksins fingu flestu suðringarnir pláss á einstøkum spjaddum setrum, men at sita saman í bólki var ikki hugsingur um. Alt í alt mundu flestu av hesum sostatt fáa eina góða fótbóltsupplivingsuppliving, men tey, sum Sosialurin hevur havt samband við, eru kortini misnøgd um tað viðferð, sum tey fingu frá fyrireikarunum. Millum annað lýsa tey háttin, sum varð nýttur, tá tey vórðu rikin frá lýsingarskeltunum, fyri vanvirðiligan og mannminkandi. - Ein skuldi trúð, at vit vóru smábørn, sum onkursvegna høvdu forbrotið okkum, var viðmerkingin frá onkrum teirra.

Flestu teirra gleddust tó um dystin, men vóru tó sera hørm um, at fyrri hálvleikur nærum var liðgt spældur, áðrenn tey rættuliga kundu njóta løtuna, sum framman undan var metta at skula gerast heilt serlig.

### Væntandi kunnleiki

Poul Michelsen, formaður í Grunninum fyri Tórsvøll, sigur við Sosialin, at tey eru fullgreið um, at nógv mistøk eru farin fram.

- Í kvøld (fríggjakvøldið) skulu vit hava fund, har vit saman gjøgnumganga tiltakið, og royna at bøta um tey mistøk, sum eru framd.

Tað, sum Poul serliga leggur dent á í hesum sambandi, er, at tað í stóran mun var væntandi kunnleiki, sum førdi til mistøkini.

Eitt nú vísir hann á, at tað var sera óheppið, at øll setrini ikki vóru raðfest við nummarrøð. Varð hetta gjørt, hevði eingin trupulleiki verið við at funnið sitipláss. Onkur hevur ført fram, at um hetta var gjørt, kundu fólk ikki á sama hátt savnast í bólkum, men Poul vísir á, at so hevði tað verið upp til keyparan at fyrireika seg soleiðis, at fleiri atgongumerki vórðu keypt í senn, soleiðis at bólkurin kundi sitið saman.

Júst hetta hevur annars verið ein trupulleiki fyrr, tá nummarraðfest atgongumerki hava verið seld til landsdystir. Tá hevur tað ofta verið trupult hjá keyparunum at fáa nóg nógv atgongumerki í einum, tí atgongumerkini hava verið spjadd um posthús kring alt landið.

Henda trupulleika eru tey tó í fer við at loysa nú, soleiðis at atgongurmerki í framtíðini skulu seljast um eina skipan á alnetinum, har posthús, kunningarstovur og onnur sølustøð hava atgongd til at bíleggja tey einstøku plássini. Slík skipan er eitt nú í Danmark, og tá sæð verður burtur frá byrjunartrupulleikum, hevur henda riggað væl.

Um trupulleikan við ókeypis atgongumerkjunum hjá børnum heldur hann, at hesin kann loysast við ta eisini børnini fáa eitt atgongumerki við nummarfestum sitiplássi, hóast hetta sum so einki kostar.

### Sjáldsamur trupulleiki

Poul Michelsen vísir annars á, at teir trupulleikar, sum vóru mikudagin, í nógvar mátar eru trupulleikar, sum ikki stinga seg upp í vanligum landsdystum:

Hann heldur, at landsdysturin móti dønum var nakað heilt serligt í fleiri mátar. Áskoðaramongdin var størri enn vanligt, og eisini ónøgdin um nógvu VIP plássini stavar frá serligum viðurskiftum, tí so at siga allir teir donsku lýsararnir, sum vóru til dystin, hava áhugamál í Føroyum, og tí høvdu teir nýtt møguleikan fyri VIP plássum til at bjóða føroyska kundaskarðanum til dystin. Poul vísir á, at hetta við VIP plássum er ein sáttmálabundin rættur, sum lýsararnir eiga, men at hesin sjáldan verður nýttur í so stóran mun, sum talan var um mikukvøldið.

Hann ásannar tó, at tað er púra greitt, at tá talan í framtíðini er um dyst, har roknast kann við fullsettum stadion, eiga fyrireikingar at verða nógv betri, og fyrsta partin av hesum verður so farið undir nú, tá tiltakið sum heild verður eftirmett.

### Glaður hóast alt

Samanumtikið er Poul Michelsen tó sera fegin um tiltakið, og tær royndir, sum teir hava fingið í hesum sambandi.

- Mín fatan er, at tey allarflestu høvdu eina sera hugnaliga øtu, og hetta eru vit sjálvandi fegnir um. Hinvegin vilja tað altíð vera nøkur, sum eru við sviðið soð, tá talan er um eitt somikið stórt tiltak, og hetta harmast vit eisini um. Eg vil tó fegin takka øllum hesum, tí í allar flestu førum vóru fólk sera beinasom, soleiðis at óneyðugar konfliktir ikki stungu seg upp.

Hann kemur tó samstundis við eini áheitan um, at áskoðararnir í størri mun eiga at respektera tær reglur, sum eru galdandi í slíkum førum: - UEFA hevur nøkur trygdarkrøv, og hesi eru ikki gjørd til stuttleikar. Hetta kann kanska vera torført hjá okkum føroyingum at skilja í ávísum førum, men hinvegin eiga reglurnar eisini at respekterast. Vit hava tó eisini okkara ábyrgd í so máta, tí kontrolskipan okkara virkaði ikki nóg væl, og hetta er so nakað, sum vit mugu royna at betra um. Hinvegin eiga vit eisini at vera eitt sindur »føroyskir«, soleiðis at alt ikki gerst ov fýrakantað, tí hetta liggur jú ikki til okkum.

Vóru trupulleikar av ymsum slag við fyrireikin og øðrum, so er tó eitt, sum Poul tykist ómetaliga fegin um:

- Eg haldi at 12. maður eigur eitt stórt herðaklapp uppiborið fyri teirra leiklut. Teir skaptu ein ótrúliga góðan stemning, og ikki minst tað, at teir nú sita á endatribununi ger, at øll hini fólkini síggja teir. Teirra leiklutur lág so avgjørt ikki eftir, og hetta varð til at gera upplivingina hjá hinum áskoðarunum enn størri, varð seinasta viðmerkingin frá formanninum fyri Tórsvøll.



*Hjá teimum flestu varð talan um eitt got fótbóltskvøld, men atfinningarnar móti fyrireikarunum vóru kortini nógvar*



# VB hevur ikki tapt úti

*Bæði teir í oddaliðnum og í NSÍ, sum ikki hevur tapt í fimm dystum á rað, eru heilt væl fyri*

Vágbingar fara norður til Runavíkar í morgin. Onkur kundi kanska ímyndað sær, at tað fer maður av húsi í Vági, men tá vit tosaðu suður í gjár, søgdu teir, at ferðalagið verður neyvan nógv størri, enn tað plagar at vera. Teir taka ein dyst í senn. Enn er ein triðingur av kappingini eftir, og tað verða fleiri spennandi dystir í Vági – ikki minst tá HB og B68 koma suður.

VB hevur vunnið seg fram á oddasessin við støðugum avrikum. Teir hava bara tapt ein dyst, og tað var á heimavølli ímóti B71. Á útivølli hava teir ikki tapt enn. Popzcynski plagar at siga, at spælararnir hjá honum eru ikki til at dúva upp á javnleik. Teir ætla sær øll stigini í Runavík, men í VB kunnu teir væl liva við einum javnleiki.

Ímóti KÍ vóru Milan Kulic og Tórður Holm leikbannaðir. Teir hava báðir verið álit á miðvøllinum, og teir vera báðir á liðnum í morgin. Tað vil við øðrum orðum siga, at bonkurin verður sterkari hesa ferð, enn hann var síðsta sunnudag.



*Seinast VB royndi seg móti NSÍ høvdu vágbingar gott tak á*

Fimm ferðir á rað

NSÍ hevur altíð verið óstøðugt. Nú hava teir vunnið tríggjar dystir á rað, og vit skulu aftur til 4. juni fyri at finna síðsta tapið. Tað var á heimavølli ímóti B36. Tað vil við øðrum orðum siga, at NSÍ hevur spælt fimm dystir á rað uttan at tapa. Í skrivandi løtu duga vit ikki at siga, um talan er um met, men tað man vera sjáldan ella ongantíð, at tað er komið fyri áður, tá NSÍ hevur verið í bestu deildini.

Trygvi Mortensen er hálvur vágbingur – pápin, Jákup, sum er formaður í NSÍ, er ættaður úr Vági. Trygvi heldur tað vera stuttligt, at eitt annað lið, enn tey, sum plaga at vera í toppinum, nú blandar seg uppí. Men hann heldur samstundis, at teir í Runavík hava nakað at hevna:

– Vit fingu góða byrjan upp á landskappingina, men tá vit vóru í Vági, vórðu vit punkteraðir, og tað gekk long tíð, áðrenn vit komu fyri okkum aftur. Nú hevur gingið væl. Vit taka ein dyst í senn, og so fáa vit at síggja, hvat tað fer at enda við. Ímóti HB lá trýstið á mótstøðumonnunum. Nú er VB oddalið, og tí liggur trýstið sjálvandi á teimum, sigur NSÍ venjarin, sum harvið roynir at halda báðum beinunum á jørðini.

Allir NSÌ spælararnir vóru tøkir ímóti HB, og allir eru tøkir ímóti VB. So fáa vit at síggja, hvussu tað fer at roynast hjá Christian Høgna Jacobsen, sum hevur verið flúgvandi síðani summarsteðgin.

Í steypakappingini vann VB 4–0 í Runavík. Í landskappingini hevur NSÌ vunnið tvey tey seinastu árini – í fjør 1–0 og 4–1 í fyrraárið. Í 1997 vann 4–1 í Runavík.

JH

# Eingin endurtøka

*Havnarmenninir eru vónbrotnir av, at teir sinniliga skuldu fara so langt niður, sum teir gjørdu ímóti NSÌ*

Í HB hava tey sleikt sárini í hesi vikuni. Tað verður ikki fjalt yvir, at dysturin ímóti NSÍ var eitt stórt vónbrot. Eitt er at tapa 5–2, og eit annað er, at liðið so at siga fór sinniliga í kjallaran og meiri ella minni fór í uppløysn:

– Hatta má ikki endurtaka seg. Um vit ikki vísa ein heilt øðrvísi hugburð ímóti FS Vágum, so kunnu vit ikki rokna við at vera oddalið og vinna FM.

Hetta sigur Hallur Danielsen. Kappingin hjá honum og fleiri øðrum spælarum um pláss á liðnum hevur verið stór síðani summarsteðgin. Men uppundir dystin ímóti vágamonnum er meiri tunnligt.

Liðformaðurin, Rúni Nolsøe, er leikbannaður, tí hann hevur fingið trý gul kort. Rumenski verjuspælarin, Florian, fekk reyða kortið ímóti NSÌ og er tískil leikbannaður. Landsmaður hansara, miðvallarin Gigi, hevur ein so álvarsligan liðbandsskaða í høgra knæi, at tað er sera ivasamt, um hann yvirhøvur verður førur fyri at spæla aftur í ár.

Allan Mørkøre var ivasamur undan NSÌ dystinum. Hann sá ikki út til at vera heilt klárur í landsdystinum, men í gjár vistu teir í HB ikki, um hann verður tøkur í morgin.

– Øll toppliðini hava torførar uppgávur síðsta triðingin av kappingini. Tað kann væl vera, at okkurt annað lið fer at blanda seg uppí. Um vit skulu vera í toppinum, so mugu vit vinna ímóti FS Vágum, sigur Hallur Danielsen.

### Lyklaspælarar burtur

Vágamenn kenna framvegis botnin brenna undir sær. Og fyritreytirnar at spæla í Gundadali í morgin eru ikki av teimum bestu. Liðformaðurin, Albert Ari Thomassen, er leikbannaður, og ein annar av stuðulsspælarunum, Tór–Ingar Akselsen, er plágaður av liðbandsskaða í fótliðnum.

Hannus Olsen hevur eisini trupulleikar við fótliðnum, men tað verður roknað við, at hann fer at royna at spæla í morgin.

JH

# GÍ fram og KÍ aftur

*Gøtumenn ætla sær í morgin at fara framvið KÍ, og teir siga seg ikki hava mist vónina at røkka heiðursmerkjaplássi*

KÍ fær í morgin vitjan av GÍ. Dystirnir millum grannaliðini plaga altíð at vera spennandi og ofta tættir. Fyrr í summar endaði uppgerðin í Sarpigerði 2–2. Í fjør endaði tað málleyst í Klaksvík, í fyrraárið vann KÍ 4–2, og í 1997 vann GÍ 5–4!

Gøtumenn hava vunnið tríggjar teir síðstu landskappingardystirnar, meðan KÍ hevur tapt tríggjar ferðir upp í slag.

Hjá GÍ eru allir spælararnir tøkir. Poul Ennigarð noyddist av vøllinum við vøddaskaða, tá fyrra umfarið ímóti B71 var hálvrunnið. Hann hevur ikki vant í vikuni, men teir rokna við, at hann verður klárur.

– Við sigri í steypafinaluni hava vit tryggjað okkum altjóða luttøku komandi ár, men vit vilja fegnir arbeiða okkum upp í landskappingini, og í morgin hava vit møguleikan at fara framvið KÍ, sigur GÍ veteranurin, Pauli Jarnskor.

Hvussu langt upp heldur tú, at tit hava møguleika at røkka?

– Tað veldst um okkara úrslit og um úrslitini hjá oddaliðunum. Vit vera ivaleyst ov stuttir til fremsta plássið – vit hava mist ov nógv í fyrru hálvu – men oddaliðini skulu øll hittast innanhýsis, og vit skulu hitta VB í Gøtu og HB og B68 á útivølli, so tað kann framvegis gerast spennandi. Men so skulu vit greiða okkara setning hvørja ferð, staðfestir Pauli Jarnskor.

### Stuðlar tøkir aftur

Hjá klaksvíkingum ræður um at venda óhepnu gongdini, sum hevur havt við sær, at teir eru dotnir úr spíssinum og niður um miðjuna á støðutalvuni:

– Tá tú í fjør hevur vunnið bæði FM og steypakapping, so er tað óhugaligt at vera niðanfyri miðjuna. Men eg haldi, at lagið hevur verið gott í vikuni, og tað hevur verið arbeitt væl undir venjing, sigur KÍ veteranurin, Harley Bertholdsen, sum vísir á, at um tað eydnast at venda gongdini, so kann KÌ framvegis koma upp millum liðini, sum fáa heiðursmerkir.

Evnaríki og ungi miðvallarin, Kristian á Lakjuni, var besti KÍ maðurin, tá klaksvíkingar vóru í Gøtu. Nú hevur hann gjørt av ikki at spæla í 1. deild, og hann verður tískil ikki tøkur í morgin.

Beiggi hansara, Heðin á Lakjuni, var leikbannaður seinast. Hann er tøkur aftur, og tað er miðverjin, Jan Andreasen, sum hevur verið plágaður av skaða, eisini. Allan Joensen hevur roynt at spæla á hægsta støði aftur, men hann hevur verið noyddur enn eina ferð at repa seglini, og hann verður ikki við í morgin.

JH

# B68 eitt og B71 tvey leikbann

*B68 venjarin hevur ikki loyvi at sita í búrinum, tá B68 heima á Sandi skal halda tørn um møguleikan fyri FM heitinum*

Jóannes Jakobsen, B68 venjarin, verður undir dystinum á Sandi í morgin ikki innanfyri girðingina. Hann fekk reyða kortið, tá tað í 2. hálvleiki stóð nógv á ímóti sumbingum.

Arnbjørn Danielsen hevur verið ein av mest álitisfullu B68 spælarunum í ár. Hann fekk gult kort ímóti Sumba og er tískil leikbannaður. Jákup Djurhuus hevur áður spælt í miðverjuni og er ein møguleiki sum avloysari.

Í B68 hava saknaðu teir fyrrapartin av vikuni tríggjar av stuðulsspælarunum. Jan C. Dam, Øssur Hansen og Fróði Benjaminsen vóru upptiknir av landsliðnum. Í gjárkvøldið skuldu teir tríggir venja aftur. Tað fer ikki minst at hvíla á teirra herðum og á álopsmonnunum Marcello, sum hevur skorað nógv síðstu ferðirnar, og á Súna Fríða Johannesen, sum er toppskjútti í 1. deild, at syrgja fyri, at B68 fær øll stigini við til hús.

### Tvey leikbann á Sandi

Hjá B71 gongur hurðin inn og út av liðnum títt. Tá teir vóru í Gøtu síðsta sunnudag vóru Eli Hentze og Jógvan Jón Petersen leikbannaðir. Í Gøtu fingu Hans Jørgen Djurhuus og Julian Floresco gult kort, og so fall hamarin. Teir eru báðir leikbannaðir í morgin.

Á plusssíðuni hjá B71 telur tað, at Valdemar Nowisci, sum fekk sera álvarsligan snudd, tá VB var á Sandi og orsaka av tí ikki fekk spælt í Gøtu, er komin fyri seg. Hann hevur vant í vikuni og verður í málinum í morgin.

Jákup Lamhauge er ein av havnarmonnunum, sum hevur ferðast um Skopunarfjørð at spæla fótbólt. Nú er hann farin av landinum í lestrarørindum og fer tískil ikki at spæla meiri í ár.

Í fjør vann B71 1–0, tá B68 var á Sandi. Í fyrraárið var B71 í 2. deild, og í 1997 vann B68 2–1 á Sandi.

JH